52-061/2020

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 61/2020 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Sirið Stenberg, løgtingsmanni, um at tryggja umstøður hjá ferðandi at halda koronutilmælini

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Ætlar landsstýrið at tryggja ferðandi úr øðrum londum umstøður at halda koronutilmælini við t.d. at hava høli til taks at vera í, meðan bíðað verður eftir farti millum oyggjarnar ?
2. Ætlar landsstýrið at tryggja ferðandi úr øðrum londum umstøður at halda koronutilmælini, tá ferðast verður við strandfaraskipunum, bussum og á flogvøllinum ?

Svar til 1 og 2:

Endamálið við tilmælunum hjá Landsstýrinum er at fyribyrgja og avmarka korunusmittubreiðsluna. Yvirskipað er tað upp til stovnar og onnur at skipa soleiðis fyri, at tilmælini kunnu verða hildin.

At ráðgeva almennum stovnum, fyritøkum, felagskapum o.ø. hevur landsstýrið skipað koronuráðgevingina, sum skal ráðgeva um, hvussu virksemið kann skipast á besta hátt í mun til at avmarka smittubreiðslu.

Reyði Krossur hevur boðað frá, at útisetar, sum koma heim til jóla, og sum skulu til Suðuroyar, eru vælkomnir at bíleggja bíðirúm í hølunum hjá Reyða Krossi á Bryggjubakka fram til og við 23. desember

Í tráð við galdandi koronutilmæli, hevur Strandferðslan tillagað sína innanhýsis tilbúgving og kunnað síni viðskiftafólk um hetta.

Allar skipsleiðslur, busseigarar og starvsfólk eru kunnað um herdu tilmælini í bussum og á Strandfaraskipunum. Samstundis hevur Strandferðslan lagt kunning út til øll ferðafólk á føroyskum og enskum, ið kann lesast á heimasíðuni hjá stovninum.

Viðvíkjandi tyrluflúgvingini, er avtala gjørd við Atlantic Airways um at kunna ferðafólk og starvsfólk tilsvarandi í mun til innanhýsis tilmælir hjá felagnum.

Strandferðslan hevur fyribils ikki tikið onnur stig í mun til eitt nú farstøðir og bíðirúm. Strandferðslan er av tí greiðu fatan, at verandi tilmælir áleggja greitt og týðiliga tí ferðandi at taka ábyrgd fyri sínari egnu atferð, meðan ferðast verður við Strandferðsluni.

Tað liggur tí eisini ein serlig ábyrgd á teimum, ið koma heim til Føroyar frá londum við høgum smittutali, at virða galdandi tilmæli og vísa samfelagsábyrgd í mun til aðrar borgarar. Hetta er eisini væl lýst í kunningini til ferðafólk. Starvsfólk og manningar eru altíð fús at vegleiða teimum, ið ynskja hetta.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

Strandferðslan fylgir annars støðuni og eru klár at herða tilbúgvingina, um neyðugt.

Í Tinganesi, 22. desember 2020

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður